LISTASTEVNA FØROYA
2002 ARTS FESTIVAL
3. - 18. august 2002

Runrig og Týr aftur á slóðina





Leygardagin
3. august
Ítróttarhøllin
á Hálsi
kl. 21
Kostnaður
225 kr

FØROYA BANKI
stuðlar Runrig
og Týr

Sigvart
Dagsland
hann gevur
styrki

Sunnudagin 4. august
Høllin í
Norðurlandahúsinum
kl. 19:30
Kostnaður 150 kr







Edda
kærleiki, drama
og trúgv úr miðøld

Leygardagin 17. august
og sunnudagin 18. august
Høllin í
Norðurlandahúsinum
kl. 19:30
Kostnaður 250 kr

Atgongumerkjasøla
Norðurlandahúsið tlf +298 317900
Kunningarstovurnar
Tórshavn tlf. +298 315788
Klaksvík tlf. +298 456939
Fuglafjørður tlf. +298 444860
Saltangará tlf. +298 449449
Vágoy tlf. +298 333455
Sandur tlf. +298 361836
Tvøroyri tlf. +298 372481
Ítróttarhøllin á Hálsi tlf: +298 311475

LISTASTEVNA FØROYA


# Lastbilur rendi saman við ferðafólkabuss



*Ein lastbilur hjá Kaj Andreasen gjørdist vrak, tá hann rendi saman við einum ferðafólkabussi í gjáramorgunin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

FERÐSLUÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Um 10 tíðina í gjáramorgunin var eitt ferðsluóhapp við Sjógv í Kollafirði. Ein ferðafólkabussur við ferðafólki úr tí stóra ferðamannaskipinum A´Rosa Blu og ein lítil lastbilur hjá Kaj Andreasen rendu saman.

Á middagsleiti í gjár visti politistøðin í Havn ikki nógv at siga. 35 fólk vóru við bussinum, og níggju av teimum gramdu seg um pínu. Tey vórðu tó ikki koyrd á skaðastovuna, men umborð á ferðamannaskipið, sum hevur egna skaðastovu og lækna.

Maðurin, sum koyrdi lastbilin, ið hevði ein kompressara viðfestan aftanfyri, fekk størri skaða. Men hann hevði fult vit tá hann varð koyrdur á skaðastovuna.

Bæði akførini verða koyrd á bileftirlitið til kanningar. Meira verður at lesa um ferðsluóhappið í blaðnum í morgin.

# Smáu flokkarnir stuðla løgmanni

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

– Eg taki ikki Tórbjørn Jacobsen fyri fult, og eg vóni, at løgmaður heldur ikki ger tað, sigur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum. Bæði hann og Kári P. Højgaard hava framvegis fult álit á løgmanni, hóast rumblið í samgonguni farnu vikurnar.

Bæði Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin stuðla framvegis samgonguni og Anfinni Kallsberg sum løgmanni.

Rumblið í samgonguni farnu vikurnar hevur ikki fingið teir báðar smáu samgonguflokkarnar at broyta hugsan um samstarvið við Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin, sum hava havt eina beiska uppgerð eftir lesarabræv hjá Tórbirni Jacobsen.

– Eg má siga akkurát sum er, at eg taki ikki Tórbjørn Jacobsen fyri fult, og eg vóni, at løgmaður heldur ikki ger tað. So leingi sum skuldsetingarnar ímóti løgmanni byggja á halv úttalilsi frá Tórbjørn Jacobsen, so hevur løgmaður ongan trupulleika, heldur formaðurin í Miðflokkinum.

Kári P. Højgaard, einasti tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin, heldur, at tað er óheppið fyri samgongustevið, at eitt gamalt mál, sum hevur verið frammi áður, skal takast fram og brúkast ímóti løgmanni.

– Vit hava havt eitt gott samstarv við Anfinn Kallsberg seinastu fýra árini, og vit hava framvegis fult álit á honum sum løgmanni, sigur Kári P. Højgaard.

## Ringt fyri arbeiðsmoralin

Anfinn Kallsberg og Tórbjørn Jacobsen hevur verið høvuðsleikararnir í heitasta politiska málinum seinastu vikurnar. Startskotið var, tá Tórbjørn Jacobsen í ein grein í bløðunum skrivaði, at løgmaður og Jørgen Niclasen høvdu eina dulda fortíð, og at teir ikki høvdu kunnað sitið í landsins leiðslu nakra aðrastaðni í heiminum.

– Tórbjørn Jacobsen átti at lagt prógvini fyri sínum pástandum fram, tí tað er á lágum plani at insinuera slíkt um løgmann. Her er talan um ein gamalt mál, sum fólk hava vitað um í nógv ár. Men tað hevur hvørki forðað fólki í at velja Anfinn Kallsberg til løgtingið ella løgtingsmonnum í at velja Anfinn til løgtingsformann, landsstýrismann og løgmann. Tí er hatta málið farið, og tað nyttar einki at draga tað fram aftur nú, heldur Jenis av Rana.

– Hetta stríðið er ikki gott fyri samfelagið, og tað kann taka arbeiðsmoralin frá øðrum politikarum. Eg vóni, at vit kunnu leggja hetta aftur um okkum, tá vit hittast aftur á ólavsøku, og fara aftur til arbeiðis.

## Skaðar álitið millum flokkarnar

Kári P. Højgaard, tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin, heldur, at seinastu vikurnar hava verið sera óhepnar fyri samgonguna.

– Hetta førir ikki til nakað, og tað bara skaðar álitið, sum hevur verið millum flokkarnar. Vit eru ikki partur av stríðnum, og vit kenna bara málið frá fjølmiðlunum, og út frá tí, sum er komið fram har, hava vit onga orsøk til at umhugsa okkara stuðul til samgonguna ella løgmann.

– Tórbjørn Jacobsen hevur sagt, at málið veruliga snýr seg um privatisering og ikki um løgmann og Jørgen Niclasen, men so er tað skilaleyst at koma við slíkum skuldsetingum, sum tyngja samstarvið í samgonguni, heldur Kári P. Højgaard.


# Bilar

Nr. 140 • hósdagur • 25. juli 2002 • 76. árg.


# Hyundai Coupé – sportsbilur til tey ungu

**Hyundai Coupé 2.0 16V**

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.0 litur 4 syl. 16V 138 hk |
| 0-100 km/t | 9,2 sek |
| Bensinnýtsla | 11,9 km/l |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 440,0 cm |
| Breidd | 176,0 cm |
| Hædd | 133,0 cm |
| Eginvekt | 1250 kg |
| Totalvekt | 1740 kg |
| Viðførisrúm | 312 litrar |
| Prísur | Kr. 269.750,- |
| Søluumboð | Sp/f Norðbil<br>Oyggjarvegur<br>FO-100 Tórshavn<br>313707 |

**Tey sum vanliga lesa motorbløð, hava lagt til merkis at nýggi Hyundai Coupé fær sera góð ummælir frá útlendskum motorjournalistum, bæði hvat útsjónd, kvaliteti og koyrieginleikum viðvíkur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Frits Dam Jacobsen er her við nýggja Hyundai Coupé, ið er ein bilur til tey ungu. Bilurin fær sera góð ummælir frá útlendskum motorjuornalistum*



*Hyundai Coupé hevur smart design*

Hyundai Coupé er ein bilur til tey ungu, ið ynskja sær ein bil, ið sær gott út og hevur sportligar koyrieginleikar. Bilurin fæst við 2.0 litur 4 syl. motori við 138 hk og 2.7 litur V6 motori við 167 hk. Komfortur og koyrieginleikar eru á høgum støði. Bilurin koyrir sum ein dreymur gjøgnum svingini, og stýringin er sera neyv og kontant. Innan er á sama hátt, alt er í sportsligum stíli og merkt av gjøgnumførdum kvaliteti. Bilurin er útgjørdur við t.d. aircondition, sportssetrum, CD-spælara og 16" alufelgum.

# CR-V – fótgangaravinarligur frítíðarbilur frá Honda

**Síðan CR-V fyrstu ferð kom á marknaðin í 1997, hevur bilurin verið ein succes hjá Honda. Fyri at siga tað stutt, so er Honda CR-V líka góður at koyra, sum hann sær út til. Nýggjasta útgávan kom á marknaðin í vár**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Hóast Honda CR-V er ein 4x4, er hann eins og ein persónbilur at koyra. Birgir Dam Jacobsen, frá Norðbil, sýnir her bilin fram*



*Í nýggju útgávuni er modellið nakað broytt við t.d. nýggjum baklyktum*

Honda CR-V er ein 4x4 frítíðarbilur, ið er eins góður at koyra og ein persónbilur, bæði á sløttum og ósløttum undirlendi. Í nýggjastu útgávuni er bilurin betraður á fleiri økjum, so sum trygd og komforti. Bilurin er gjørdur soleiðis, at um hann rennur á ein fótgangara, gevur fronturin eftir, so fótgangarin fær minst møguligan skaða. Hetta fekk CR-V besta karakterin fyri á seinastu EuroNCAP krasj-testunum. Motorurin er ein 2.0 litur bensin við 150 hk. Bilurin er sera væl útgjørdur við t.d. aircondition, CD spælara, nógvum plássi til at leggja lutir frá sær, armlen við kopphaldara, eins og plátan í viðførisrúminum kann gerast um til eitt campingborð og 12V elstikkara í viðførisrúminum.

**Honda CR-V 2.0i VTEC**

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.0 litur 4 syl i-bensin 150 hk |
| 0-100 km/t | 10,0 sek |
| Bensinnýtsla | 11,0 (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 205/70-15 |
| Stødd og vekt | |
| Breidd | 457,5 cm |
| Breidd | 178,0 cm |
| Hædd | 171,0 cm |
| Eginvekt | 1425 kg |
| Totalvekt | 1925 kg |
| Viðførisrúm | 527 litrar |
| Prísur | LS útgávan kr. 288.750,-<br>ES útgávan kr. 306.750,- |
| Søluumboð | Sp/f Norðbil<br>Oyggjarvegur<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel.313707 |